# "VIT KLÁRA OKKUM SO LEINGI VIT ERU TVEY"

Støðan hjá fólkapensjónistum í Føroyum



## Innihaldsyvirlit

Inngangur ..... 3

Pensjónistar í Føroyum ..... 4

Arbeiðsmarknaðurin dregur ..... 7

"Vit klára okkum, so leingi sum vit eru tvey." ..... 9

Gerandisdagurin ..... 11

- Frítíð ..... 12
- Flytføri ..... 15
- Heimið ..... 16

Samanumtikið ..... 19

## Inngangur

Fólkapensjónistar verða ofta umrøddir í hagtølum, og myndin, ið kemur fram í miðlunum, er ofta ov einsíðug – vaksandi eldrabyrða, fátækraváði, sjúka og einsemi. Slík hagtøl geva eitt gott yvirlit yvir støðuna, men hvussu trívast føroyskir fólkapensjónistar? Hvussu sær teirra gerandisdagur út?

Hetta rit er gjørt fyri at fáa eina neyvari mynd av, hvussu gerandisdagurin hjá føroyskum pensjónistum sær út. Tí valdi Javnaðarflokkurin á Fólkatingi at gera samrøður við nakrar pensjónistar í Føroyum fyri at lýsa teirra gerandisdag. Í fyrsta parti koma vit við hagtølum og fakta um pensjónsútgjøld. Við støði í samrøðunum koma vit síðani inn á arbeiðsmarknaðin. At enda koma vit inn á gerandisdagin, har vit serliga hava lagt dent á nøkur afturvendandi evni í samrøðunum viðvíkjandi frítíð, flytføri, fíggjarstøðu og sosialu broytingini, tá ein pensjónerast.

Í november 2014 gjørdi Javnaðarflokkurin á Fólkatingi nakrar samrøður við pensjónistar í Tórshavn, Eysturoynni og Klaksvík. Talan var um tríggjar stakar og fimm giftar pensjónistar. Ritið er sostatt ikki bygt á ein umboðandi úrskurð av pensjónistum, men skal bert lýsa nøkur øki, ið hava serliga ávirkan á gerandisdagin sum pensjónistur í Føroyum.

## Pensjónistar í Føroyum

Í Føroyum er pensjónsaldurin 67 ár, og í hesum riti nýta vit heitið pensjónistur um aldursbólkin *67 ár og eldri*. Mynd 1 vísur broytingina í fólkatalinum í Føroyum síðani 2005 – býtt í aldursbólkar. Her sæst, at fólkatalið seinastu tíggju árini ikki er broytt stórvegis – úr 48.337 í 2005 niður í 48.228 í 2014. Áhugavert er, at einasti aldursbólkur, ið er vaksandi, er *67 ár ella eldri* – tey vóru 5.717 í 2005, meðan tey í 2014 vóru 6.818. Hetta er ein vøkstur við 1.101 fólkum.

**Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum seinastu 10 árini.**

**Fólkatalið í Føroyum býtt í aldursbólkar**

| | 00-06 ár | 07-15 ár | 16-66 ár | 67 ár o.e. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| 2005 | 4 974 | 7 031 | 30 615 | 5 717 | 48 337 |
| 2006 | 4 950 | 6 885 | 30 596 | 5 739 | 48 170 |
| 2007 | 4 933 | 6 746 | 30 894 | 5 754 | 48 327 |
| 2008 | 4 867 | 6 623 | 31 042 | 5 851 | 48 383 |
| 2009 | 4 946 | 6 498 | 31 312 | 5 946 | 48 702 |
| 2010 | 4 812 | 6 511 | 31 140 | 6 105 | 48 568 |
| 2011 | 4 755 | 6 499 | 30 941 | 6 320 | 48 515 |
| 2012 | 4 598 | 6 500 | 30 675 | 6 511 | 48 284 |
| 2013 | 4 480 | 6 498 | 30 479 | 6 635 | 48 092 |
| 2014 | 4 493 | 6 457 | 30 468 | 6 810 | 48 228 |

Kelda: Hagstovan

Í Føroyum hava øll, ið eru fylt 67 ár, rætt til fólkapensjón, ið er samansett av eini grundupphædd, eini viðbót og samhaldsfasta. Øll, ið eru fylt 67 ár hava rætt til fulla grundupphædd, ið ikki verður mótroknað aðrari inntøku. Mynd 2 er yvirlit yvir, nær ein hevur rætt til ymsu útgjøldini.

**Mynd 2: Faktaboks um pensjónsútgjøld.**

| | Faktaboks |
|---|---|
| Fólkapensjón | Rætt til útgjald hava persónar, sum hava fylt 67 ár. Fólkapensjónin er samansett av eini grundupphædd og eini viðbót. |
| Samhaldsfasti | Rætt til útgjald hava allir persónar, sum hava fastan bústað í Føroyum, eru skrásettir í fólkayvirlitinum og eru fyltir 67 ár. |
| Eftirløn | Er tað ein sjálvur hevur spart saman í eini eftirlønarskipan, ið síðan verður útgoldið, tá ein fer á pensjón. |
| Brennistuðul | Pensjónistar og persónar, ið fáa varandi veiting sambært § 13 í forsorgarlógini, hava rætt til eina viðbót. Viðbótin verður vanliga kallað "brennistuðul". |

Støk og gift fáa ikki somu grundupphædd, men grundupphæddin og viðbótin er eitt vet hægri hjá støkum fólkapensjónistum enn hjá giftum. Um ein stakur pensjónistur arbeiðir og hevur eina ársinntøku omanfyri 61.900 kr., so verður viðbótin inntøkujavnað. Viðbótin hjá hjúnum verður inntøkujavnað, um teirra samlaða ársinntøka er omanfyri 80.000 kr. Viðbótin er ikki skattskyldug. Eftirløn verður eisini mótroknað í viðbótini, um hon fer upp um inntøkumarkið. Mynd 3 vísir pensjónsupphæddirnar í 2014.

**Mynd 3: Pensjónsútgjøld pr. persón.**

| Pensjónin 2014 | | |
|---|---|---|
| | **Støk** | **Gift** |
| Grundupphædd | 50.028 | 39.756 |
| Viðbót* | 39.252 | 30.372 |
| Brennistuðul | 7.608 | 3.804 |
| Samhaldsfasti* | 35.160 | 35.160 |
| *Ársinntøka* | *132.048 kr.* | *109.092 kr.* |
| Skattskyldug inntøka | 74.412 | 65.532 |
| Landsskattur[1] | 1.882 | 106 |
| Kommunuskattur (miðal 21,15%)[2] | 9.389 | 7.511 |
| Kirkjuskattur (miðal 0,65%)[3] | 289 | 231 |
| Heilsutrygd | 2.329 | 2.280 |
| *Skattur og gjøld tilsamans* | *13.889 kr.* | *10.128 kr.* |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld/ÁR** | **118.159 kr.** | **98.964 kr.** |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld/MÐR** | **9.847 kr.** | **8.247 kr.** |

Kelda: Landsfelag Pensjónista og Almannaverkið.

*Skattskyldug inntøka

Sum sæst á myndini omanfyri, so fær ein stakur pensjónistur 9.847 kr. um mánaðin, tá skattur og onnur gjøld eru drigin frá, meðan ein giftur pensjónistur fær 8.247 kr. Tað vil siga, at eini hjún fáa tilsamans 16.494 kr. um mánaðin.

[1] Botnfrádráttur 65.000 kr. Skattur 20%.
[2] Botnfrádráttur 30.000 kr. Miðalskattur 21,15%
[3] Botnfrádráttur 30.000 kr. Skattur 0,65%

**Mynd 4: Býtið av pensjónsútgjøldum.**




Kelda: Hagstovan

Omanfyri sæst, at 64 prosent av pensjónistum í Føroyum fáa grundupphædd við fullari viðbót, tað vil siga, at tey í mesta lagi hava eina ársinntøku afturat pensjónini, ið ikki er omanfyri 61.900 kr. 9 prosent av pensjónistunum fáa grundupphædd við skerdari viðbót, meðan 27 prosent bert fáa grundupphæddina. Umframt at fáa fólkapensjón so hava fleiri pensjónistar eisini aðra inntøku. Mynd 5 niðanfyri vísir, at seinastu tíggju árini hevur talið á løntakarum, ið eru 67 ár og eldri, ligið beint omanfyri 14 prosent.

**Mynd 5: Fólkatal, 67 ár og eldri.**




Kelda: Hagstovan

## Arbeiðsmarknaðurin dregur

Flestu starvsfólk innan tað almenna skulu frá, tá tey fylla 67 ár, meðan summi størv loyva fólki at arbeiða, eftir tey eru farin um tey 67 árini – serliga innan privata arbeiðsmarknaðin. Orsøkirnar, til at fólk velja at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum, hóast tey hava rokkið pensjónsaldur, eru ymiskar. Í samrøðunum við pensjónistarnar var tosað eitt sindur um arbeiðsmarknaðin. Gjøgnumgangandi var, at flestu teirra ynsktu at vera á arbeiðsmarknaðinum, eftir tey fyltu 67 ár.

***"Um eg var einligur, og einans hevði pensjón, so er spurningurin, hvat var eftir til mat, kringvarp, olju, streym og alt tílíkt, skuldi eg goldið einsamallur. Tá trúgvi eg, at tað hevði strammað álvarliga í."***

Arbeiðsmarknaðurin dregur uppá fleiri mátar: onkur teirra valdu at vera verandi á arbeiðsmarknaðinum, eftir tey fyltu 67 orsakað av sosialu samveruni – og onnur fyri at fáa eitt sindur eyka at liva fyri. Ein teirra vísti á, at hann hevði enn hug at arbeiða, hóast hann var vorðin 81 ár, um heilsan hevði loyvt tí.

***"Eg arbeiddi seinnapartar, til eg var 81 ár. Tá var eg so lamin, at eg slapp ikki upp úr songini. Eg kundi gott hugsað mær at arbeitt nú, men eg tori ikki fyri heilsuni."***

Tað er ein stór sosial broyting at gevast á arbeiðsmarknaðinum og gerast pensjónistur. Summir av luttakarunum í kanningini sóu tað sum eina stóra kollvelting at fara frá sosiala og aktiva arbeiðsplássinum til at vera heima, har tað kann gerast ov friðarligt. Tískil ynsktu tey at vera longri á arbeiðsmarknaðinum. Hóast fleiri av pensjónistunum, vit tosaðu við, ynsktu at vera longri á arbeiðsmarknaðinum, so vístu tey eisini á, at tað loysir seg ov illa fíggjarliga at arbeiða, tá ein er farin um pensjónsaldur.

Mynd 6: Pensjónsútgjøld pr. persón við og uttan eyka inntøku.

| Dømi: Inntøka stakur pensjónistur | | |
|---|---|---|
| | **Bert fólkapensjón** | **Við aðrari inntøku** |
| Grundupphædd | 50.028 | 50.028 |
| Viðbót* | 39.252 | 22.392 |
| Brennistuðul | 7.608 | - |
| Samhaldsfasti* | 35.160 | 35.160 |
| Onnur inntøka* | - | 90.000 |
| *Ársinntøka* | *132.048* | *197.580* |
| Skattskyldug inntøka | 74.412 | 147.552 |
| Landsskattur | 1.882 | 16.510 |
| Kommunuskattur (miðal 21,15%) | 9.389 | 24.850 |
| Kirkjuskattur (miðal 0,65%) | 289 | 764 |
| Heilsutrygd[1] | 2.329 | 2.732 |
| *Skattur og gjøld tilsamans* | *13.889* | *44.857* |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld ÁR** | **118.159** | **152.723** |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld MÐR** | **9.847** | **12.727** |

Kelda: Almannaverkið og egnar útrokningar

*Skattskyldug inntøka

Mynd 6 vísir munin á inntøku eftir skatt, um ein pensjónistur hevur eina ársinntøku á 90.000 kr. afturat pensjónini. Hjá viðkomandi verður árliga viðbótin skerd við 16.860 kr. So sjálvt um pensjónisturin hevur tjent 90.000 kr. gjøgnum árið, so er fíggjarligi vinningurin bert knappar 35.000 kr., tí brennistuðulin fellur eisini burtur. Men fleiri av luttakarunum vístu á, at hóast tað ikki loysir seg so væl at arbeiða, tá ein er farin á pensjón, so ger tað stóran mun at kunna forvinna sær eitt sindur við síðuna av pensjónini.

Fleiri av luttakarunum nevndu, at tey ikki høvdu spart nakað serligt upp til eftirløn. Hetta var ikki so vanligt fyrr, sum tað er í dag. Luttakararnir í kanningini, sum høvdu spart upp til eftirløn, vóru á einum máli um, at eftirlønin hevði avgerandi týdning fyri teirra fíggjarstøðu.

***"Eg havi ongantíð spart upp til eftirløn, og tað var heilt ótrúliga býtt, men tað gjørdi man ikki tá."***

Tann 1. januar 2014 kom nýggj lóg um eftirløn í gildið, sum áleggur øllum arbeiðstakarum millum 21 ár og pensjónsaldur at spara upp til egna eftirløn. Hetta hevur ikki verið lógarkrav áður.[4] Hetta merkir, at í framtíðini fara allir borgarar at hava eftirløn.

## "Vit klára okkum, so leingi sum vit eru tvey."

Í samrøðunum vóru tað serliga støku pensjónistarnir, ið løgdu dent á trong fíggjarlig kor. Sjálvt um ongin teirra kærdi sína neyð, so vístu tey á, at útreiðslurnar eru tungar, tá man skal standa fyri øllum sjálvur. Hóast støk fáa størri veiting enn pør, so er ilt at fáa endarnar at røkka, tí nógv av gjøldunum eru ikki tilsvarandi lægri, tá ein er einsamallur – eitt nú el, olja, internet og kringvarpsgjald.

***"Eg haldi, at sjálvt um tvey fáa minni pensjón í part, so klára tey seg betur enn tey, sum eru einsamøll."***

Hetta segði ein av pensjónistunum í samrøðuni. Veruleikin, at tað er lættari at klára seg fíggjarliga, tá tey eru tvey, er ein støða, sum skjótt kann venda. Fleiri av luttakarunum vístu á, at tey óttast dagin, tá annar teirra doyr. Nógv av pørunum søgdu seg fáa peningin at røkka, sum støðan er nú, men tey høvdu ilt við at síggja, at hetta fór at bera til, tá annar teirra doyr.

***"Um húsini ikki vóru útgoldin, so veit eg ikki, hvussu tað hevði gingist. Tað hevði skjótt verið ein onnur mynd, tað er so heilt vist."***

Ein pensjónistur vísti á trupulleikan við at verða stakur og hava nógvar útreiðslur. Føstu útreiðslurnar tykjast at vera ein byrða, og tískil er tað stórur fyrimunur at hava útgoldin hús fyri at minka um føstu útreiðslurnar.

---

[4] http://www.taks.fo/01671/

**Mynd 7: Prosentpartur í fátækraváða.**

%-partur í fátækraváða eftir kyni og aldri 2012

| Aldursbólkar | Kvinnur | Menn | Bæði kyn |
|---|---|---|---|
| 0-17 ár | 10,8 | 10,9 | 10,9 |
| 18-24 ár | 12,6 | 7,8 | 10,0 |
| 25-54 ár | 8,1 | 6,4 | 7,2 |
| 55-66 ár | 6,1 | 7,4 | 6,8 |
| 67 ár o.e. | 23,5 | 16,2 | 20,0 |
| **Allir aldrar** | **11,1** | **9,0** | **10,0** |

Kelda: Hagstovan. Tey, sum liggja undir 60% av javnvirðisinntøkuni, eru í fátækraváða – sí meira á heimasíðuni www.hagstovan.fo

Sambært greining frá Hagstovuni frá 2012 verður tað víst á, at aldursbólkurin, sum er í hægsta fátækraváða, eru tey 67 ára gomlu og eldri. Mynd 7 vísir prosentpartin av føroyingum býtt á kyn og í aldursbólkar, ið eru í fátækraváða í 2012. Heili 20 prosent av teimum, ið eru 67 ár og eldri, eru í fátaækraváða. Fyri kvinnur í bólkinum er talan um næstan ein fjórðing, ið eru í fátækraváða. Hetta kann vera, tí at kvinnur liva í miðal 4 ár longri enn menn, og tá tær gerast einkjur, so eru tær verri fyri fíggjarliga enn áður.

Um vit hyggja eftir tølunum fyri fátækraváðan um okkara leiðir, so liggja Føroyar tó í lægra endanum í mun til grannar okkara.

**Mynd 8: Prosentpartur í fátækraváða Norðurevropa.**

Prosentpartur av persónum í fátækraváða

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|
| **Føroyar** | **8,8** | **8,5** | **9,0** | **10,0** |
| Danmark | 13,1 | 13,3 | 13,0 | 13,1 |
| Ísland | 10,2 | 9,8 | 9,2 | 7,9 |
| Noreg | 11,7 | 11,1 | 10,4 | 10,0 |
| Svøríki | 13,3 | 12,9 | 14,0 | 14,2 |
| Finnland | 13,8 | 13,1 | 13,7 | 13,2 |
| Írland | 15,0 | 15,2 | 15,2 | .. |
| Bretland | 17,2 | 17,1 | 16,2 | 16,2 |

Kelda: Hagstovan

## Gerandisdagurin

Fíggjarstøðan tykist at vera avgerandi fyri, hvussu stórt rásarúm pensjónistar hava, og hvussu lívsgóðskan er. Tað er torført at gera eina heildarlýsing av gerandisdegnum hjá pensjónistum, tí at fíggjarstøðurnar eru so ymiskar. Summi høvdu útgoldin hús, ímeðan onnur ikki høvdu. Tó kann sigast, at nógvar óvæntaðar útreiðslur, sum eitt nú umvælingar, kunnu standast, hóast ein hevur útgoldin hús. Summir luttakarar nevndu, at fíggjarstøðan er so trong, at ikki er møguligt at keypa gávur, skifta vindeygu, keypa nýggjar brillur ella at fara til tannlækna.

***"Eg kundi hugsað mær nýggjar brillur, sum eru dupultar, men einar tílíkar kosta 8.000 krónur, og tað hava vit ikki ráð til. Eg havi eisini brotið eina tonn, og eg kundi hugsað mær nýggjar tenn, men tað kostar fleiri túsund krónur, so tað letur seg ikki gera."***

Hetta ávirkar í tann mun, at tey føla seg avbyrgdan frá vanligum viðlíkahaldi av egnum kroppi og heimi. Kroppurin viknar og krevur ofta eyka umsorgan fyri at uppihalda somu lívsgóðsku.

Fyri tey, ið ikki hava so nógvan pening um hendi, er tískil neyðugt at hugsa nógv um, hvørja vøru man keypir, tá keypt verður inn.

***"Vit hava nøkulunda fast húsarhald. Tað er siðbundin matur, eisini føroyskur. Tá vit keypa í handlinum, hyggja vit sjálvandi eftir prísum og tilboðum."***

Flestu matvøruhandlarnir í Føroyum geva út tilboðsbløð hvørja viku. Hetta gera nógv sær dælt av fyri at spara pening. Samrøðurnar vístu á, at tað verður hugsað nógv um at keypa bíligar vørur og at keypa vørur, sum eru á tilboð. Tað er ikki altíð møguligt at keypa kostnaðarmiklar døgurðavørur sum eitt nú kjøt, fisk og annað. Fyri nógv er tað serliga døgurðamaturin, ið er kostnaðarmikil, og tí hevur tað nógv at siga, um tey fáa fisk og annað frá familju og vinum. Í Føroyum er trygdarnetið oftast sterkt, og flest hava sterk familjusambond. Støðan hjá pensjónistum hevði verið ein onnur, um tey ikki høvdu fingið ókeypis mat frá familju og vinum. Samrøðurnar vístu á, at maturin, sum verður givin frá familju og vinum, munar sera nógv í gerandisdegnum. Ein vísti á, at tað hevði staðið illa til við døgurðamati, um viðkomandi ikki fekk mat ókeypis.

***"Tá man býr á bygd, keypir man ikki fisk. Eplir og fisk fær man, og innímillum fær man eisini ein kjøtbita. Eg rokni við, at tað er ikki tað sama í Havn sum her á bygd. Eg keypi næstan ongantíð døgurðamat."***

Tó meintu fleiri pensjónistar, at hetta er nakað, ið serliga bygdafólk fáa ágóðan av, ímeðan tey, ið búgva í høvuðsstaðnum, ikki í sama mun fáa ókeypis døgurðamat.

## Frítíð

Gongdin frá at vera virkin á arbeiðsmarknaðinum til at vera pensjónistur hevur nógvar broytingar við sær. Pensjónistar skulu sum oftast umstilla seg til ein gerandisdag, sum er nógv øðrvísi enn tann vanligi gerandisdagurin, sum tey høvdu áður. Broytingarnar hava við sær, at flest pensjónistar fáa økta frítíð. Tað er ymiskt, hvussu pensjónistar tillaga seg nýggju broytingina og sostatt eisini, hvat teir velja at brúka frítíðina til.

***"Tað er ein sosialur munur á at vera á pensjón og at vera í arbeiði, og tað visti eg áðrenn. Men eg rokni við, at tað eru fleiri, sum ikki vita tað. Tá man gevst brádliga, so missir man alt umhvørvið og alt netverkið, og tað eru fleiri, ið ikki eru klár yvir tað. Tað kann vera stuttligt tann fyrsta mánaðin, gangi eg út frá, men tað er øgiliga skjótt, at fólk isolera seg og ongantíð vísa seg aftur ímillum fólk."***

Í kanningini "Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av lívskorum hjá fólkapensjónistum", ið Fróðskaparsetur Føroya gjørdi í september 2010, varð millum annað spurt inn til ymsu frítíðarmøguleikarnar hjá pensjónistum[5]. Úrslitini vístu, at pensjónistar velja at verða partur av ymsum frítíðarítrivum, sum verða boðin út kring landið. Samstundis vísti kanningin eisini, at tað er munur á ítrivum, alt eftir hvar í landinum ein er. Í Tórshavn eru tað sera nógv, sum velja at ganga í bindiklubb, á kvøldskúla og at gera sjálvboðið arbeiði. Aðrastaðni í landinum eru tað meiri ítróttardystir, bingo og pensjónistafeløgini, sum draga. Kanningin vísti eisini, at tað er munur á, hvat menn og kvinnur velja at luttaka í. Kvinnurnar eru virknari í hondarbeiðsøkinum, bingo, pensjónistafeløgum, kvøldskúlum, skeiðum og sjálvbodnum arbeiði. Menninir eru virknari í at

[5] Jacobsen, Bjørg: *Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av lívskorum hjá fólkapensjónistum,* Fróðskaparsetur Føroya, søga- og samfelagsdeildin, september 2010.

brúka teldu, ganga á fundi, til fyrilestrar, til ítróttardystir, uttanduraarbeiði og at fást við seyð ella onnur kríatúr.

Nógv verður gjørt fyri pensjónistar í Føroyum, og tað er sera ymiskt, hvørji tilboð kommunurnar hava. Tilboðini kunnu vera alt frá kvøldskúlum til dagtilhald og pensjónistafeløg. Tað er upp til tann einstaka, um hann/hon ynskir at nýta tey tilboð, ið eru. Samrøðurnar vístu, at tað er ymiskt, um luttakararnir velja at taka av tilboðunum í kommununi. Onkur segði seg trívast best heima, meðan onnur vilja verða við, at summi ikki koma til tiltøk, tí tey hava ikki ráð.

***"Eg gangi í dagtilhaldinum, og tað hevur nógv at siga fyri meg, tí eg trívist best ímillum fólk. Maðurin trívist best heima, so eg lati heimið upp í hendurnar á honum, og so fari eg út."***

Ein annar luttakari vísti á í samrøðuni, at tað ofta eru peningaligar forðingar, fyri at pensjónistar ikki velja at nýta frítíðartilboðini. Hetta tykist at vera nakað, sum summir pensjónistar ikki tosa um.

***"Man hoyrir ofta pensjónistar brúka sum umbering, at teir ikki tíma til ymisk tiltøk, men í veruleikanum er tað ongin, sum vil siga, at tey ikki hava ráð***."

Fleiri av samrøðunum vístu, at luttakararnir dáma sera væl at ferðast uttanlands, men peningurin strekkir ikki til. Fyri tey, ið einans hava fólkapensjón, er tað ikki altíð líka lætt at finna peningin at ferðast fyri, sjálvt um hugurin er til tess.

***"Vit hava ikki ráð til at ferðast. Fólk, sum bara fáa fólkapensjón, kunnu ikki ferðast. Eg elski at ferðast, so vit høvdu ferðast, um vit høvdu fleiri pengar."***

At ferðast uttanlands er ikki ein sjálvfylgja hjá teimum, ið einans liva av fólkapensjón, men fyri tey, ið hava egna eftirløn, er tað munandi lættari at fáa ráð at ferðast. Eftirspurningurin og tørvurin á at ferðast tykist at verða felags fyri nógvar pensjónistar. Pensjónistafeløg sum eitt nú Landsfelag Pensjónista og ferðavinnan skipa fyri ferðum fyri pensjónistum.

Sambært kanningini hjá Fróðskaparsetrinum var víst á, at næstan alt virksemið minkar við árunum[6]. Orsøkin er í flestøllum førum helst viknandi heilsa og svinnandi netverk, sum ger tað trupult ella fyri nøkur ómøguligt at taka lut í ymsum virksemi.

Nógv verður gjørt kring landið at fáa eldru borgarar meiri virknar í gerandisdegnum. Landsfelag Pensjónista hevur við tiltakinum "Okkara Lív sum Eldri", arbeitt við at menna trivnaðartilboðini til eldru borgararnar[7]. Hetta er ein liður í "Okkara Lív sum Eldri" - verkætlanini, ið er norðurlendsk verkætlan, ið lýsir trivnað og vælferð hjá eldru borgarum. Úrslit vísa, at besti mátin at hava góða heilsu er at verða virkin, og tað er júst hetta, sum fleiri kommunur hava tikið til sín. Í verkætlanini "Okkara Lív sum Eldri" skulu kommunurnar skapa karmarnar fyri einari virknari pensjónistatilveru. Kommunur kring landið hava gjørt ymiskt fyri at røkka málinum, og eitt nú hevur verið skipað fyri eldradøgum í Vági, har heitið á hesum var "Virkin sum longst".

Verkætlanin "Okkara Lív sum Eldri" skal eisini betra um sosialu netverkini hjá pensjónistum. Ymiskt er, hvussu pensjónistar kenna seg sosialt. Meðan nøkur hava maka, familju og vinfólk, tá tey pensjónerast, so eru tað fleiri, ið kenna seg einsamøll. Í omanfyrinevndu kanning hjá Fróðskaparsetrinum vóru nógv, sum nevndu, at tey kendu seg einsamøll stóran part av tíðini og saknaðu at vera meira saman við fólki. Fyri summi var tað heilsan, ið setti mørk fyri sosialari samveru, fyri summi var tað grundað á vánaligt ferðasamband, og tey høvdu lítlan hug at plága onnur um at koyra seg ymsastaðni.

Ein í samrøðunum hjá okkum vildi vera við, at tað serliga eru kvinnurnar, ið nýta tilboðini, sum eru til tey eldru. Hann vísti á, at tað er eins og menninir hvørva, tá teir fara av arbeiðsmarknaðinum.

***"Tá eg fór av arbeiðsmarknaðinum, vóru tað nógvir gamlir starvsfelagar, her hugsi eg um mannfólk, sum eg ikki hitti aftur. Eg hugsi mangan, hvat mundi blíva av teimum? Tú møtir teimum ikki til tiltøk ella í einum handli. Tað er eins og menn stagnera og krógva seg burtur, tá teir fara á pensjón. Tað eru nakrir heilt fáir, sum koma út ímillum fólk."***

[6] Jacobsen, Bjørg: *Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av lívskorum hjá fólkapensjónistum,* Fróðskaparsetur Føroya, søga- og samfelagsdeildin, september 2010.
[7] http://www.eldri.fo/our+life+as+elderly.html

Um menn stagnera og krógva seg meira burtur enn kvinnurnar er ringt at meta um. Men um vit hyggja eftir kanningini hjá Fróðskaparsetrinum og hyggja at, hvussu leingi tey eldru hava verið á arbeiðmarknaðinum, tá sæst ein stórur munur. Stórsti parturin av monnunum høvdu verið á arbeiðsmarknaðinum í 30 ár ella meira, og allir høvdu arbeitt fulla tíð. Hjá kvinnunum var heilt øðrvísi: ein knappur triðingur av teimum elstu kvinnunum í kanningini høvdu ongantíð arbeitt úti, men bert heilt fáar í yngru aldursbólkunum høvdu ongantíð verið á arbeiðsmarknaðinum[8].

Fyrr var ovurstórur munur á arbeiðsmynstrunum hjá kvinnum og monnum. Tí er tað væl hugsandi, at tá kvinnurnar, sum vóru heimagangandi, fóru á pensjón, so var tað ikki ein eins stór kollvelting fyri teirra gerandisdag sum hjá monnunum, ið høvdu havt sín gerandisdag á arbeiðsmarknaðinum meginpartin av sínum lívi.

Sum heild vóru luttakararnir í kanningini nøgd við tilboðini, sum kommunurnar og ymsu feløgini hava at bjóða teimum. Ein vísti á nøgdsemi við at vísa á góðu umstøðurnar, sum kommunan hevur at bjóða henni.

***Vit pensjónistar hava sera góðar umstøður her í kommununi. Vit samlast í tilhaldinum tvær ferðir um vikuna. Eg gangi eisini til fimleik tvær ferðir um vikuna, har kommunan hevur skipað tað soleiðis, at vit verða koyrd aftur og fram í bussi. Eg haldi, at tað er kommununi at takka, at vit hava tað so gott.”***

## Flytføri

***“Eg orki so illa at ganga, so eg má hava bil. Tá vit einaferð ikki hava bil longur, so má eg bara sita inni.”***

Ikki einans fyri pensjónistar, men fyri flestu føroyingar er bilurin ein neyðug útreiðsla, tí møguleikarnir at koma frá einum stað í annað eru ofta avmarkaðir, um ein ikki hevur bil. Onkrar kommunur so sum Tórshavnar kommuna, Eysturkommuna og Klaksvíkar kommuna hava ókeypis bussleiðir til allar teirra borgarar. Í øðrum kommunum koyrir bussleiðin, men títtleikin er avmarkaður, og ofta eru steðgistøðini langt frá summum húsum.

[8] Jacobsen, Bjørg: *Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av lívskorum hjá fólkapensjónistum,* Fróðskaparsetur Føroya, søga- og samfelagsdeildin, september 2010.

Samrøðurnar vístu, at luttakararnir frá bygd søgdu, at tað var sera umráðandi at hava bil, tí at við árunum gerast tey illa gongd og alsamt meiri lamin og orka tí ikki so væl at ganga strekkini, har bussurin steðgar. Eisini er tað torført at fara til handils, um ein ikki hevur bil, tí at so hevur ein eisini posar at bera við sær. Um tey ikki høvdu høvi at hava bil, so vóru tey eisini noydd at fáa vinir og familju at koma til handils og gera onnur ørindi við teimum. Hetta avmarkar frælsið munandi. Frælsið at fara til ymisk ítriv og har einum lystir vera skerd, og hetta er við til at gera, at pensjónistar kunnu verða isoleraðir í egnum heimi.

Luttakarar frá høvuðsstaðarøkinum høvdu somu áskoðan, men hildu tað tó vera lættari at ferðast við bussi, um steðgistøðini vóru nær húsum teirra. Um steðgistaðið var ov langt frá húsum, so kundi tað gerast torført, um ein var illa gongdur, og tá hevði verið brúk fyri bili.

Kommunur og pensjónistafeløg skipa fyri bussi til pensjónistar, so at tey kunnu koma til ymisk ítriv. Hetta hildu luttakararnir vera er eitt gott átak, men kann ikki samanberast við at hava egnan bil, tí at viðkomandi kann ikki sjálvur velja, hvagar leiðin gongur. Onkur helt, at bilur er ein luksusvøra, og er tí ikki bráðneyðug at hava bil. Hetta er tó ymiskt, alt í mun til hvussu væl fyri pensjónistarnir eru, og um tey búgva tætt við almenna ferðslu og handlar. Ein teirra fer so langt sum at vísa á, at uttan bil hevði tað staðið so illa til, at viðkomandi hevði helst verið noyddur at skift bústað.

***“Eg havi varhugan av, at tað eru nógv, sum halda, at televarp, telefon, internet og bilur er ikki nakað, ið pensjónistum tørva. Men vit skulu jú liva normalt, og eg hevði verið handikappaður, um eg ikki hevði ein bil.”***

## Heimið

Tá ein er komin upp í árini, kann tað verða trupult at hava orku til allar tær húsligu uppgávurnar, ið eru ein partur av at búgva í egnum húsi. Allir luttakararnir vóru á einum máli um, at orkan at gera reint var ikki, sum hon hevði verið fyrr.

***"Tað er munur á ikki at klára nøkur húslig ting sjálvur og so at hava tørv á at búgva á einum heimi. Um tey eldru fingu eitt sindur av hjálp, so kundu tey flestu klárað seg í egnum heimi til tey eru 90 ára gomul."***

Felags fyri allar pensjónistarnar, ið luttóku í samrøðunum, var, at teir ynskja at verða búgvandi í egnum heimi sum longst. Tað eru tó ikki øll, ið orka allar tær húsligu uppgávurnar og mugu tí flyta. Men um tey verða noydd at flyta úr egnum heimi, hava tey flestu eitt ynski um at verða búgvandi í heimbygdini, tí at har hava tey familju og vinir rundan um seg.

Tað er umráðandi at vera tætt at familju og vinum, um ein hevur tørv á hjálp við ymiskum, bæði tá tað kemur til reingerð, biltúr og annað. Luttakararnir í kanningin vístu allir á, hvussu umráðandi tað er at fáa hjálp frá familju og vinum, tá ein ikki hevur møguleikan at fáa hjálp frá landinum.

Pensjónistarnir í kanningini vóru allir væl tilvitaðir um almennu tilboðini, men serliga var tað heimahjálpin, ið tey bitu merki í og høvdu hug at fýlast á, tí fleiri teirra mettu, at heimahjálpin var betri fyrr, og at nú slapp heimahjálpin onki at gera. Eftir tølunum at døma er talið av teimum, ið fáa heimahjálp, farið niður við meira enn helvtini frá 2005 til 2013.

**Mynd 9: Tal av fólki, ið fær heimahjálp, býr á eldrasambýli og røktarheimi**




Kelda: Hagstovan

Sambært Almannaverkinum stavar minkingin í heimahjálpini frá, at í 2009 varð avgerð tikin um, at heimatænastan ikki skuldi gera reint fyri fólk. Avgerðin varð sett í verk so við og við í 2009 og 2010. Hetta sæst eisini aftur á myndini, har serliga  frá 2008 til 2009 er eitt stórt lop. 717 fingu heimahjálp í 2008, og 511 fingu heimahjálp í 2009. Samanumtikið kann sigast, at ímeðan samlaða talið av aldursbólkinum 67 ár og eldri er vaksið seinastu árini, og nøkur røktarheimspláss eru komin afturat, er samlaða talið av teimum, ið fáa heimahjálp fallið.[9]

Á myndini sæst, at talið á teimum, ið búgva á sambýlum, hevur verið støðugt millum 140 og 175 frá 2005 til 2013. Hetta sama tíðarskeiðið eru 200 fleiri pláss komin afturat á røktarheimum.

***"Pengarnar hava tey tikið frá heimahjálpini, ið er blivin pínd niður í næstan onki. Tað einasta, tú kanst fáa heimahjálpina at gera, er at vaska tær. Men hvør letur onnur vaska sær? Tá tað er komið so langt út, tá kann alt gera tað sama. Eitt sindur av stoltleika hevur man hóast alt."***

Pensjónistarnir í kanningin ynskja at vera sjálvbjargnir so leingi sum møguligt og ynskja at búgva í egnum heimi sum longst. Tó høvdu tey verið glað at fingið hjálp við eitt nú reingerð. Hetta tykist tó ikki at vera raðfest í nóg stóran mun, so at tað nøktar tørvin.

1. januar 2015 varð eldraøkið lagt út til kommunurnar. Tískil er tað nú upp til kommunurnar at avgera, hvørt heimahjálpin skal/kann gera reint fyri móttakarar av heimahjálp. Í flestu kommunum er tað tó enn soleiðis, at um ein ynskir hjálp til reingerð, má ein keypa sær hesa tænastu frá privatum fyritøkum. Tá er treytin, at ein betalir reingerðina sjálvur, og av tí at fíggjarligu støðurnar hjá pensjónistum í Føroyum eru so ymiskar, eru tað ikki øll, ið hava ráð til tað. Onkrar kommunur bjóða tó ókeypis vaskihjálp til pensjónistar.

[9] http://www.lg.fo/files/skyrslur_2014/Notat%20til%20Logtingsgrannskodararnar_Heimataenastan.pdf

## Samanumtikið

- Nógvir av luttakarunum høvdu hugin at vera verandi á arbeiðsmarknaðinum, eftir tey fóru um pensjónsaldur – bæði av sosialum og fíggjarligum ávum. Hóast fleiri av luttakarunum nevndu, at skatturin er høgur, so gjørdi tað mun at hava eina eyka inntøku afturat pensjónini.
- Tað er fíggjarliga tyngri hjá stakum pensjónistum enn hjá hjúnum – giftu pensjónistarnir stúrdu fyri fíggjarligu støðuni, tá annar doyr.
- 20 prosent av pensjónistum í Føroyum eru í fátækraváða.
- Døgurðamatur frá familju og vinum er ein stór hjálp fyri fíggjarstøðuna.
- Tað eru serliga kvinnurnar, ið eru aktivar og taka lut í mongum av frítíðartilboðunum, sum eru til eldri. Menninir hava í stóran mun lyndi til at hvørva, tá teir gevast á arbeiðsmarknaðinum.
- Sjálvt um fleiri kommunur hava ókeypis bussar, so hevur bilurin nógv at siga fyri flestu av okkara luttakarum.
- Allir luttakararnir ynsktu at vera búgvandi í egnum heimi sum longst.

JAVNAÐARFLOKKURIN Á FÓLKATINGI



mars 2015